UTTAN ÚR HEIMI

## Kravdi Bush og Blair í rættin

Heimskendi bretski rithøvundurin Harold Pinter var fyrradagin í Stockholm og tók ímóti ársins Nobelvirðisløn í bókmentum. Harold Pinter fekk krabbamein í hálsin fyri trimum árum síðani, og læknarnir høvdu rátt honum frá at fara til Stockholm. Men hann valdi kortini at fara.

Takkarrøða hansara var í stóran mun politisk, men tað kom ikki óvart á áhoyrararnar, tí Harold Pinter hevur ongantíð dult fyri, at hann heldur lítið um George W. Bush, forseta. Tað var kortini ikki bara Bush, sum fekk av grovfýlini, men amerikanskur uttanríkispolitikkur sum heild.

-Síðani seinna heimsbardaga hevur USA styðjað hvørt einasta hernaðareinaræðið í heiminum, og amerikanska framferðin hevur verið skipað, harðlig og fullkomiliga eirindaleys, segði tann kendi rithøvundurin í takkarrøðuni.

Harold Pinter var harðliga ímóti, at amerikanarar og bretar lupu á Irak, og tað kríggið gloymdi hann heldur ikki hesaferð.

-Álopið á Irak var ein brotsgerð og ein háðan ímóti allari altjóða lóggávu, segði hann og kravdi, at Bush og Tony Blair verða ákærdir og drignir fyri altjóða dómstólin í Haag.

## Bretar hækka oljuskatt

Í sambandi við fíggjarlógina fyri 2006 hevur bretska stjórnin gjørt av at hækka skattin hjá feløgunum, sum útvinna olju og gass í bretska partinum av Norðsjónum.

Berlingske Tidende skrivar, at danska felagið A.P. Møller er eitt av feløgunum, sum fær sviðan av skattahækkingini. Sambært blaðnum merkir hækkingin, at danska felagið skal gjalda umleið eina hálva milliard krónur meiri í skatti um árið.

Mærsk Olie og Gas, sum er dótturfelag hjá A.P. Møller, keypti fyri fimm mánaðum síðani tíggju framleiðsluøki í bretska partinum av Norðsjónum fyri 18 milliardir krónur. Nú fær felagið heldur minni burturúr, enn tað hevði roknað við.

## Nógvir bilar úr Kina

Kinesiska bilframleiðslan veksur so skjótt, at nú útflyta kinesarar fleiri bilar, enn teir flyta inn, sigur BBC.

Útflutningurin tíggju teir fyrstu mánaðarnar í ár var tvær ferðir størri enn í sama tíðarskeiði í fjør, samstundis sum innflutningurin minkaði eitt vet. Í tølum merkir tað, at kinesarar útfluttu 135.000 bilar, samstundis sum teir keyptu 128.000 bilar úr øðrum londum. Tað eru yvirhøvur Vietnam, Sýrialand og Algeria, sum keypa nógvar bilar úr Kina, men BBC sigur, at kinesarar eru í ferð við at leita eftir betri marknaðum. Eitt nú ætla teir at royna fleiri lastbilar og vøruvognar á amerikanska marknaðinum.

Tann stóri búskaparvøksturin í Kina hevur sett ferð á bilframleiðsluna, og sambært BBC eru fleiri bilverksmiðjur í gerð ymsastaðni í landinum. Samstundis hava útloendskar verksmiðjur fingið sær deildir í Kina.

## Nazi-tónleikur væl umtóktur

Tað hóvar týsku myndugleikunum illa, at nazi-tónleikur vísir seg at vera rættiliga væl umtóktur ímillum fólk.

Áhugin fyri konsertum við nazi-tónleiki er veksandi, samstundis sum tónelikahandlarnir siga, at teir selja alt fleiri og fleiri sløgur við nazi-tónleiki, skrivar AP. Men tað er minni enn so alt, sum er lógligt, og í oktober staðfestu myndugleikarnir í landslutinum Brandenburg ikki færri enn 729 brot á lógina.

Myndugleikarnir í Brandenburg siga, at tað er torført at halda eyga við nazi-tónleikinum, tí nógv verður selt í tí dulda, men tað er kortini lítil ivi um, at sølan er veksandi, siga teir.

# Ein býarmynd hvørvur



*Nú verður tann seinasti „dupultdekkarin“ í London settur*

**Í dag verður tann seinasti „dupultdekkarin“ í London tikin úr rutu**

FERÐSLA
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Síðani tann 24. juni í 1954 hava teir eyðkendu reyðu „dupultdekkararnir“ verið ein serligur partur av býarmyndini í London, men nú fer tann seinasti í søguna. Hesin bussurin hevur koyrt á rutuni ímillum Marble Arch og Streatham Garage, men í dag verður hann settur.

Tá „dupultdekkararnir“ vóru í vælmnaktini, koyrdu ikki færri enn 2.700 bussar av hesum slagnum í gøtunum í London.

Tað sermerkta við hesum bussunum er, at teir eru opnir aftan, so fólk kunnu koma uppí ella fara av har. Hetta hevur víst seg at vera gott hjá teimum, sum eru løtt á sær, men vandamikið hjá øðrum. Í meðal hava vanlukkur við „dupultdekkarunum“ kravt trý-fýra mannalív um árið, skrivar Reuter úr London.

# Vandi fyri fleiri flóðaldum í Suðurasia

**Ein amerikanskur granskari ávarar nú um, at vit kunnu vænta fleiri flóðaldur í Indiska Havinum í komandi árum**

NÁTTÚRA
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Um fjúrtan dagar er eitt ár, síðani tann oyðandi flóðaldan skolaði inn yvir strendurnar í fleiri asiatiskum londum og kravdi meiri enn 200.000 mannalív.

Flóðaldan stóðst av einum hørðum jarðskjálvta undir havbotninum við indonesisku oynna Sumatra, og nú ávarar amerikanski professarin Kerry Sieh um, at vit kunnu vænta fleiri jarðskjálvtar og flóðaldur har í komandi árum.

Kerry Sieh sigur, at jarðskjálvtin annan jóladag í fjør byrjaði tíggju kilometrar undir vatnskorpuni og flutti umleið 100 kilometrar av havbotninum. Tað seinasta árið hevur hann kannað umstøðurnar, og niðurstøðan er, at tað er stórur vandi fyri, at tað sama skal endurtaka seg.

Vandin fyri einum nýggjum, hørðum jarðskjálvta er serliga stórur á Mentaweileiðini, sum er nakað sunnan fyri jarðskjálvtaøkið í fjør, og sambært professaranum akn ein flóðalda haðani gera serliga stóran skaða í teimum báðum indonesisku býunum Pedang og Bengkulu, sum eru har suðuri á Sumatra.

- Okkara meting er, at ein tíggju metrar høg flóðalda kann raka teir báðar býirnar, sigur Kerry Sieh við BBC og vísir á, at serliga kring Pedang er lendið sera lágt.

Tann stóri spurningurin er sum vera man, nær ein tílík flóðalda kann koma, men tað veit amerikanski professarin ikki. Hann sigur seg tó vera rættiliga vísan í, at tey, sum nú eru børn, koma at uppliva tað.

Granskarar vita, at jarðskjálvtin við Sumatra annan jóladag í fjør var ikki tann fyrsti. Í 13. øld var ein harður jarðskjálvti har, sum elvdi til stóra flóðaldu, og tað sama hendi fyri 120 árum síðani.